## Fleiri gistingar

Alt fleiri gista á hotellunum í Íslandi. Í januar vóru næstan 50.700 gistingar, og tað var heilar 10.300 ella 26 prosent fleiri enn í januar í fjør, skrivar Morgunblaðið. Hagtølini vísa, at øll hotellini kring landið fingu ágóða av vøkstrinum burtursæð frá hotellunum á Norðurlandinum. Tað vóru serliga teir útlendsku gestirnir, sum gjørdu mun í januar. Útlendsku gistingarnar vóru 34 prosent fleiri enn í januar í 2005. Tær íslendsku vóru 9 prosent fleiri.



## Lobby í Bruxelles

Fíggjarnevndin hjá grømlendska Landstinginum og er í hesum døgum á vitjan í Bruxelles saman við nøkrum embætisfólkum. Formaðurin í nevndini, Ellen Christensen, sigur við grønlendska útvarpið, at nevndin fer at tosa við limir í ES-tinginum um ávís viðurskifti, eitt níu handil við kópaskinnum. Í hesum sambandi ætlar nevndin at greiða ES-tinglimunum frá, at grønlendingar drepa ikki kóp á sama ógvusliga hátt sum kanadiumenn.

# g allan heim



*Nýggi kunningarleiðarin á Sandoyar Kunningarstovu Fríðtór Debes hevur áður arbeitt sum sølumaður, m.a. hjá Eysturoyar Heilsølu. Nú skal hann "selja" Sandoynna útlendingar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

» *Um eini seks ár – kanska – verður koyrandi við tunli til Sandoy. Tá skuldi helst eitt hotell ella okkurt líknandi staðið onkustaðni her í oynni*

## Heimurin er okkara marknaður

Fyri Fríðtór er eingin ivi um, at ferðavinnan fer at hava stóran týdning fyri føroyska búskapin í framtíðini – ja, henda vinnan fer at verða eitt av stóru beinunum, sum Føroyar fara at standa á.

- Her eru óanaðir møguleikar, sum hann tekur til.

Um hugt verður eftir fiskivinnuni, so kann talan verða um góð ár ella um ring ár. Tá talan er um ferðavinnu í Føroyum er hon ikki ávirkað av slíkum viðurskiftum. Hon kann bara økjast!

- Hugsa vit veruliga um tað, er allur heimurin okkara marknaður. So er bert upp til okkum at fáa marknaðarfært Sandoynna.

- Oyggin er óspilt, lægsta oyggin og so er hon eisini sera vøkur. Ja, tað ræður um at finna okkara egna image fram, og sum fólk vilja fáa lut í, sigur Fríðtór.




*Á Sandoynni finnast nógv søgufróð fólk og nógvar søgur eru at siga frá. Her greiðir Sólvit Simonsen á Sandi frá eini hending í Sands kirkju, meðan Fríðtór Debes lýður á*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Børnini á Sandi sleppa um nøkur ár í nýggjan barnaskúla*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nýggjur skúli til Sandsbørn

**Á Sandi verða í løtuni gjørdar fyrireikingar til at fara undir nýggjan barnaskúla. Tann verandi er meiri enn 120 ára gamal, og er ikki tíðarhóskandi longur**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandur:** – Gongur sum ætlað kunnu vit bjóða tann nýggja barnaskúlan út í summar, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi.

Arbeitt hevur verið við hesi ætlanini í eini fimm ár, har fólk úr kommununi, skúlastýrinum og lærarar hava tosað saman um krøv, støðd og annað í sambandi við ætlaða skúlan.

Nú er liðugt at tekna uppskotið, og fer sjálv prosjekteringin í gongd í næstum. Um tríggjar mánaðir ella so skal arbeiðið kunna bjóðast út.

– Her verður talan um ein góðan barnaskúla til dagsins standard, sigur borgarstjórin við Sosialin.

Í uppskotinum verður eisini tikin hædd fyri einum hugsandi fólkavøkstri, um ætlaði Sandoyartunnilin gerast veruleiki.

### Snotuligur skúli

Gamli bygdarskúlin hevur nú tænt fyri seg í 123 ár. Í løtuni ganga einir 40 næmingar í 1. til 4. flokki í skúlanum.

Her vóru upprunaliga tvær skúlastovur og íbúð til læraran. Síðani eru broytingar framdar, soleiðis at skúlastovurnar eru vorðnar fleiri.

Men hetta er hóast alt ikki nóg mikið til at nøkta dagsins tørv á einum barnaskúla. Tí hevur ein arbeitt við ætlanini um ein nýggjan bygdarskúla.

Hesin nýggi skúlin fer at hava fimm vanligar stovur, umframt einar 8-10 serstovur. Ætlandi fer sjálv byggingin av taka hálvtannað ár.

Skúlin kemur at standa í bønum omanfyri timburhandilin á Sandi. Hann verður í tveimum hæddum og fer at hava lyftu.

Í løtuni ganga næmingarnir í 5. og 6. flokki á Sandi í Meginskúlanum í Sandoy. Men tá nýggi barnaskúlin er liðugur fara hesir næmingarnir aftur heim á Sand at ganga í skúla.

Sum skilst er talan um ein sera snotuligan bygning.

# Selja fyrst – gøtunavnið kemur aftaná

Stórur eftirspurningur er eftir grundøkjum í Runavíkar kommuni.

Farið er undir at selja grundøki framvið einum vegi í Rituvík. Hesin vegurin skal gerast, og hevur nústani fingið navn.

Av hesi orsøk varð neyðugt at geva hesum vegastrekkinum eitt navn. Og á seinasta býráðsfundi hjá Runavíkar býráð varð avgjørt, at vegurin í hesi útstykkingini skal eita "í Kass".

Á Skálafirði er somuleiðis ein nýggjur vegur tikin í nýtslu, uttan navn.

Á sama býráðsfundi varð skotið upp at vegurin skal kallast "Gerðavegur" av teirri einfaldu orsøk, at vegurin gongur gjøgnum fleiri gerði.

**sb.**